## DAGSINS MEINING

# Uttan samstarv – eingi framstig

Kring allan heimin fylkist í dag fjøldin av fólki: skrúðgongur og reyðir fánar, 1. Mai-dags-hald, eggjandi røður og arbeiðara- og samhugasangur, tónleikur, kaffi, øl og skemt. Hetta er ein partur av altjóða arbeiðara- og samhugadegnum, har krøv og mál verða borin fram, og har sigrar og framstig verða staðfest, sum dømi um, at berjast vit í felag fyri eini sak, vinna vit at enda.

Tað grundleggjandi í stevnuni hjá tí demokratisku arbeiðararørsluni er samhaldsfesti og javnaður. Hesa stevnu hevur rørslan - politiskt og fakliga - roynt at fremja í verki. Á arbeiðsplássum, í samráðingum, í politiskum arbeiði, í tjóðartingum og í altjóða felagsskapum. Um henda rørlsa ikki fekk fastatøkur í fólki, serliga í Evropu og í Norðurlondum, hevði fólkaræði ikki stungið so djúpt. Og vit høvdu ikki fingið tey vælferðarsamfeløg, sum fólk í øðrum londum og heimspørtum misunna okkum.

Tað sama er galdandi í Føroyum, hóast tað gekk rúm tíð, áðrenn føroyskir fiskiemnn og arbeiðarar megnaðu at stovna fakfeløg, og seinri ásannaðu, at uttan ein politiskan arbeiðaraflokk var torført at vinna nakrar veruligar batar fyri tað vanliga fólkið.

Hóast tann tjóðskaparligi spurningurin hevur sett onnur mál á dagsskránna - og eisini spjatt føroysku arbeiðararørsluna - ber til at staðfesta, at ómetalig framstig eru gjørd og nógvir sigrar eru vunnir. So seint sum í farnu viku eydnaðist tað at fáa Løgtingið at broyta dagpeningsaskipanina, so tímalønt eisini fáa løn frá fyrsta sjúkradegi.

Stríðið fyri sosialum rættvísi hevur ongan enda - úr høgru verður jú alla tíðina stríðst ímóti - og tí er framegis týdningarmikið, at føroyskir løntakarar eru tilvitandi um, at tann samhaldsfasta hugsjónin skapar tað frægasta samfelagið - eitt samfelag fyri øll!

Í fakfeløgunum verður í dag fyrst og fremst ímóti at fáa eitt gott úrslit burtur úr samráðingunum, ein góðan sáttmála, so tann tímalønti fær meira at liva fyri, og eina betri eftirløn í ellisárum! Tað er einki at ivast í, at tey, sum í dag samráðast, fáa eitt gott úrslit, og í komandi tíðum megna at seta nýggj mál, endurskoða gamlar siðir, ýta av av nýggjum, so arbeiðararørslan ikki stirvnar, men alla tíðina gongur á odda í samfelagsmenningini!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# "Same procedure …" á barnaansingarøkinum

**Foreldrafelagið**

**Ein tragikomisk endursending**

Aftur í ár hevur nógv rok verið um mannagongdina, Tórshavnar Kommuna hevur valt í sambandi við fráboðanir um stovnspláss.

Fyri okkum, sum eygleiða, og eisini minnast eitt ár ella meira aftur í tíðina, minnir hetta ikki heilt sørt um hin kenda "90 ára føðingardagin", sum nýggjárskvøld á hvørjum ári verður sýndur í Sjónvarpinum. Orðini "*same procedure as last year*", renna einum í huga.

Men munur er á 90 ára føðingardegnum og ansingartrupulleikanum. Tað kann væl vera, at mannagongdin, sum Tórshavnar kommuna hevur valt í hesum máli, nærum er komisk. Haraftur-ímóti eru afturvendandi trupulleikarnir, fyri barnafamiljurnar ikki komiskir, men tragiskir.

Tá tað fréttist, at sama mannagongd varð fylgd í ár sum undanfarnu árini, mótmælti Foreldrafelagið beinanvegin, og vísti á væntandi opinleika. Samstundis hava nógv foreldur vent sær til kommununa fyri at frætta nærri. Síðani hava myndugleikarnir, bæði politikarar og umsiting, verið í øllum fjølmiðlunum, partvís fyri at senda svartaper víðari og partvís fyri at siga, at hetta fer at gerast betri í framtíðini. — Hetta er bæði komiskt og tragiskt.

Onkur vil kanska vera við, at tað júst er tað tragiska og tað komiska, sum gera lívið so dýrabært. Gaman í, lívið hevði kanska verið keðiligt uttan. Men mark skal verða fyri, hvussu nógvan komikk og hvussu nógva tragediu neyðugt er við. Og í hesum førinum eru vit vorðin móð og troytt av at verða vitni til: "*Same procedure as last year*", óansæð um talan er um tragediu, komikk ella tragikomikk.

**Fyrsta endursending**

Komiskt hevur verið at frætt frá umsitingini, at talan er um eitt mistak og at tey ætla at broyta mannagongdina komandi ár. Men hetta er ikki rætt, tí eitt mistak er, tá ein fer skeivur uttan at vita tað; tá ein ætlar at gera eitt, men av óvart kemur at gera nakað annað. Í sovornum føri átti mistakið at verða rættað til næstu ferð. Men hetta er ikki hent enn.

Tragiskt er at staðfesta, at tað sum Tórshavnar Kommuna hevur gjørt í ár, er tað sama, kommunan hevur gjørt øll hini árini; væl vitandi, at hetta ørkymlar barnafamiljurnar. Barnafamiljurnar verða ikki bert tiknar av ræði, uttan at fáa innlit í mannagongd, tær fáa eisini at vita, at tær hava misskilt alt, at tær ikki skilja málið.

"*Same procedure as last year*"

**Onnur endursending**

Komiskt hevur verið at hoyrt samgongupolitikarar tosað í fjølmiðlunum um, at spurningurin nú skal loysast, at tað ikki er rætt, at foreldur kenna seg ótrygg við skipanina og at tað eigur at verða kannað beinanvegin, hvussu hetta skal kunna broytast.

Tragiskt er at eygleiða, hvussu barnafamiljurnar uttan møguleika fyri at ávirka gongdina, verða noyddar líða undir, at spurningurin ongantíð verður loystur. Hetta tí politikarar ikki virða rættindini hjá barnafamiljum til ansing.

"*Same procedure as last year*"

**Triðja endursending**

Komiskt hevur verið at hoyra andstøðupolitikarar tosa um opinleika og konkretar loysnir á hesum øki, serstakliga tá ein veit, at teir onga ávirkan hava á hetta mál.

Tragiskt er at hugsa um, at barnafamiljurnar mugu sita og ásanna, at júst somu politikarar áður hava sitið við róðrið uttan at gera nakað við spurningin.

"*Same procedure as last year*"

**Hvør verður løntur?**

Tað er komiskt ella tragiskt, alt eftur hvørji eyguni eru, sum síggja, at talan ikki er um ein Hollywood film. Um so var, hevði Tórshavnar Kommuna heilt víst verið tann stóri 'Oscar'-slúkarin til árligu "Acadamy Award' stevnuna.

Umsitingin var farin avstað við einum Oscari fyri bestu instruktión, m.a. tí tað er eydnast teimum (enn einaferð) at billa okkum inn, at talan er um eina heilt nýggja 'genru', nevnliga eitt mistak, ikki bara vanliga mannagongd.

Umsitingin var eisini farin avstað við einum Oscari fyri bestu klipping, m.a. tí at tað eydnast teimum at býta um høvd og hala við at siga, at tað eru foreldruni, og ikki kommunalu myndugleikarnir, sum einki skilja.

Samgongan var farin avstað við einum Oscari fyri besta mannliga høvðusleiklutin, m.a. tí at tað hevur eydnast at billa okkum inn, at nú er øðrvísi enn undanfarnu næstan 30 árini, og at tað veruliga verður gjørt nakað fyri at loysa málið hesuferð.

Andstøðan var farin avstað við einum Oscari fyri besta mannliga eykaleiklutin, m.a. tí at tað er eydnast, so stutta tíð eftir 4 ár í leiðslusessinum, at billa okkum inn, at nú ber knappliga til hjá teimum at koma við konstruktivum loysnum.

Um hetta er tragiskt ella um hetta er komiskt, er kanska ikki so lætt at semjast um.

Men at hetta er "*same procedure as last year*", er einki at ivast í.

Foreldrini og børnini, sum eru producentanir, t.e. tey sum fíggja allan sjónleikin, høvdu verið við sviðusoð til 'Acadamy Award' stevnuna. Tey eru reduseraði til statistar í sínum egna leiki, og sum flestum kunnugt, fáa statistar ongan Oscar. Hetta er sjálvandi ikki komiskt, hetta er bara tragiskt.

Og so er tað sjálvandi eisini "*same procedure as last year*".

**'Same procedure .".**

Sjónleikurin, sum fer fram í fjølmiðlunum í hesum døgum, er bæði tragiskur og komiskur samstundis, alt eftir, hvussu hugt verður at honum.

Komiskt er at síggja, hvussu myndugleikarnir, eins og sprellimenn, loypa á leistum og lova gull og grønar skógir, tá teir eru í fjølmiðlunum.

Tragiskt er at síggja, hvussu Tórshavnar Kommuna fer við sínum borgarum og serstakliga teimum yngstu borgarunum.

Framferðarhátturin hjá Tórshavnar Kommunu, bæði politikarum og fyrisiting, er ikki eitt mistak, heldur ikki eitt undantak. Mistaki lærur ein av, og undantak, sum orðið eisini sigur, er nakað, sum víkir frá vanligari mannagongd.

Tórshavnar Kommuna sær ikki út til at hava lært av 'mistøkum' sínum, tí tað sum nýliga varð gjørt, víkir ikki frá, men er føst mannagongd. Og at kalla eina fasta mannagongd fyri eitt mistak, tað er tragikomiskt

Sostatt er ikki at gera ov nógv av at siga, at talan er um "*same procedure as last year*". Í roynd og veru er hetta at gera ov lítið av. Í veruleikanum er talan um "*same procedure as every year*".

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Føroyingar vardu seg longst móti ILA

**Hans Jacobsen, form. Føroya Havbúnaðarfelag**

Í Sosialinum 27. apríl stendur dagsins meining undir yvirskriftini "Ein nátturugøla og føroysk líkasæla".

Vanliga geri eg ikki viðmerkingar til blaðgreinar, tí sum oftast verður tað bert orð móti orði og mangan endar hetta á lágum støði, sum ikki tænir nøkrum endamáli.

Í hesum føri kenni eg tað sum mína skyldu sum formaður fyri Føroya Havbúnaðarfelag at gera nakrar viðmerkingar ril greinina. Nú veit eg ikki hvør í hesum føri hevur ført pennin í dagsins meining, eg havi ilt við at trúgva at tað er blaðstjórin, hann kenni eg bara sum ein skilagóðan mann, og ein blaðstjóra við ábyrgd. Men líkamikið, so er tað blaðstjórin, sum hevur ábyrgd av blaðnum, og ikki minst leiðaranum, og hesin leiðarin er sera einstáttaður og negativur.

ILA var fyrstu ferð ávíst í 1984 á einum smoltbrúki á Bremnes í Hordalandi. ILA breiddi seg sera skjótt í Noregi og í 1990 blivu staðfest 90 ILA sjúk alibrúk framvið so at siga allari norsku strondini. Í 1991 vóru 141 norsk alibrúk avbyrgd vegna ILA sjúkuni. Árini frá 1991 og fram til 1996 var rættuliga friðaligt viðvíkjandi ILA, men so mentist ILA sjúkan aftur soleiðis at í 1997 vóru 7 útbrot og í 1998 13. Í 1997 bleiv ILA staðfest í Kanada og í 1998 var ILA funnin bæði í alibrúkum í Hetlandi og Skotlandi har sjúkan gjørdi nógv um seg.

• 1. november 2000 stóð at lesa í Intrafish:

Vaksinert mot ILA og PD om to-tre år: ILA, pancreas desease og lakselus vil om få år være en saga blott når vaksinert mot sykdommen er ferdig utviklet. - Vi venter å se enkelte av slike vaksiner på markedet om to til tre år, sa forskningssjef Odd Magne Rødseth på Fiskeridirektoratets og Havforskningsinstituttets jubileumskonfernase. Det finnes allerede en vaksine mot ILA som er til utprøvning i Canada, men denne er ikke så god som de kommende vaksinene vil være, skriver Norsk Fiskeoppdrett.

• 9. januar 2001 stóð at lesa í Intrafish: "ILA-slakting av 350 tonn i sør: Utbrudd av laksesjukdommen ILA gjør at all laks (350 tonn) hos Skartveit Fisk på Halsnoy i Ryfylke i Rogaland skal slaktes i dag. Fylkesveterinæren har bestemt at slaktingen skal starte tirsdag. Ingenandre anlegg ser foreløpig ut til at ha fått smitten, men veterinæren vil foreta hyppige kontroller i nabo-anlegg.

• 20. marts 2001 stóð at lesa í Intrafish um ILA í USA: .. flere oppdrettsanlegg i Maine, USA

• 23. marts 2001 stóð at lesa í Intrafish: Fremskritt i ILA-forskning. Nye fremskritt er gjort i forskning på ILA- viruset. Nå har forskerne klart å identifisere proteinet på viruset og sitter også med alle gensegmentene til viruset. Dette gjør veien til en ILA-vaksine kort

• 27. apríl 2001 stóð aftur at lesa í Intrafish:

ILA funnet i Maine, USA: tredje anlegget der ILA er påvist, bare siden januar… anleggene ligger bare få kilometer fra hverandre i Cobscook Bay.

Tað ber ikki til at siga við vissu á hvønn hátt smittan er komin til Føroyar. Tað kann vera villfiskur ella útsloppin alifiskur, lús og fuglur kunnu eisini hava smittuna við sær. Spurningurin um hvussu vit best fyribyrgja at slíkar sjúkur koma inn á okkara aliøkir er jú altíð sera áhugaverdur.

At ein brunnbátur er komin úr Hetlandi "við sjúkuni" sum greinin sipar til, er mær púra ókent. Tá ILA tók seg upp í Fuglafirði var nakað av tosi um báturin sum flutti fóður frá Havsbrún til Hetland. Eisini var nevnt tey skip, sum landa sild og makrel til Havsbrún sum møguliga hava pumpa sjógv úr tangunum á fjørðin.

Alt hetta eru gitingar, tað sum stendur eftir er, at ILA er komin; men vit kláraðu í hvussu er at verða hana fyriuttan longri enn tær stóru alitjóðirnar uttan um okkum.

Hvørt tað er gjørligt at umganga hesa virussjúkuna í føroyskari aling er ilt at meta um. Staðfestast má í hvussu so er, at sjúkan hevur rakt allar aðrar alitjóðir, og at hesar hava valt eina strategi, har tær leggja dent á sjúkraverju við ymsum tiltøkum so sum generatiónsskilnaði, passandi fjarstøðu millum alibrúkini og skilagóðari aling við atliti til sjúkraspreiðing á ymsan annan hátt.

At so leiðarin við einum ósakligum málburði dregur uppí málið súrløguna sum stavar frá slógnum av alifiskinum í Fuglafirði og sum stendur í tangum við gamla Leirvíksvegin vísir tað sera lítlu virðing Sosialurin hevur fyri alivinnuni.

Fyri 1 1/2 ári síðan tók alivinnan stig til at gera eina tilbúgvingarskipan. Hetta var _ ár áðrenn ILA sjúkan kom. Hetta arbeiði verður liðugt í summar. Í hesi skipan verða fyribyrgjandi tiltøk sett í verk eins og mannagongdir í samband við sjúkraútbrot.

Alivinnan arbeiðir eisini við spurninginum um slógvið frá alifiski, tá sjúka er staðfest. Í slíkum føri er neyðugt at hitaviðgera slógvið og deyða fiskin sambært ES-krøvum. Í hesum sambandi kann tó nevnast, at hvørki í Noregi ella Skotlandi hevur hetta verið neyðugt, teir nýta súrløguna beinleiðis í fóðurframleiðsluni til ferføttu krýatúrini. Tað sýnist her, sum ES hevur sett strangari krøv móti føroyskari alivinnu enn síni egnu og norskari. Tað er m.a. av hesi orsøk at súrløga stendur í tangum á Leirvíksvegnum tí ikki slepst av við slógvi fyrr enn viðgerðin er farin fram ella tað er brent á brennistøð.

Tað kundu verið ymiskt annað at nevnt; men ætlanin er ikki at fara út í nakað politiskt blaðkjak. Tað er eingin í alivinnuni, sum roknaði við at vit sluppu undan teim sjúkum, sum eru rundanum okkum Hinvegin halda vit at vit hava verið á varðhaldi og alivinnan her á landi er í flestu førum á hædd við kappingarneytarnar - eisini tá tað snýr seg um fyribyrging og mannagongdir við sjúkum. Tá ið ein nýggj sjúka kemur á okkum, so er tað ikki so løgi at tað rakar hart í byrjaninni; men so hvørt læra vit eisini at virka undir teim umstøðunum og vinna á trupulleikunum.

# Nýggj amnesty-nevnd

TÍÐINDASKRIV

Eftir aðalfundin í Amnesty International Føroya Deild 18. apríl hevur nýggja nevndin nú skipað seg. Á aðalfundinum fór formaðurin Ingibjørg Berg úr nevndini. Í hennara stað var Anna Maria Persson vald í nevndina. Hini trý, sum stóðu fyri vali, vóru øll afturvald.

Á nevndarfundi mikukvøldið skipaði nýggja nevndin seg við Anniku Sølvará sum formanni. Jette Hoydal er næstformaður, og Erling Isholm er kassameistari. Hinar báðar í nevndini eru Hildur Patursson og Anna Maria Persson. Tiltakslimir eru Maria Heradóttir og Jórun Arge.

Á aðalfundinum varð formansfrágreiðingin fyri ár 2000 løgd fram, og hon er at finna á heimasíðu felagsins www.amnesty.fo <http://www.amnesty.fo> . Urgent Action bólkinum legði eisini fram sína ársfrágreiðing, og hon er sjálvandi eisini at finna á heimasíðuni, saman við hópin av øðrum áhugaverdum tilfari um Amnesty International og um mannarættindi.

# Viðmerking til Heðin Mortensen - dag og vika 24.04.2001 og Leivur Hansen - Sosialurin 26.04.2001

**Katrin Bjarnadóttir**
*leiðari á Vøggustovuna á Konmansmýru*

Eg vil takað undir við Heðin Mortensen um at øll børn eiga at fáa tilboð um ansingarpláss. Tað er eisini heilt í tráð við tað nýggju dagstovnalógina - men tað ber ikki til at koyra børn á stovn uttan at kaga eftir kyn og aldur.

Leivur Hansen hevur ætlanir um at leggja bíðilistan út á heimasíðuna hjá Býráðnum tað dugi eg ikki at síggja nakra nyttu í, tað fer bert at skapa enn meira øsing millum foreldur og kanska elva til persónligt agg millum fólk.

Sum vøggustovuleiðari noyðist eg at hugsa minst 3 ár fram í tíðina tá eg taka nýggj børn inn á stovnin, tí eg má tryggja mær (og foreldrunum) at hetta fitta barn, ið kemur inn á vøggustovuna eisini slepp-ur í barnagarð tá tað verður umleið trý ár.

Fyri fáum árum síðani vóru børnini 1/2 ár tá tey byrjaðu á stovnið, men nú eru flestu børnini fylt ár og nógv eru enn eldri áðrenn tey byrja í vøggustovu.

Í vøggustovu ganga børnini nú í knapt 2 ár, meðan tey í barnagarði ganga frá tey eru 3 til 7 ár, tað vil siga 4 ár og so skal ein ikki verða professari fyri at rokna út at tað letur seg ikki gera at taka børnini inn 100 % eftir bíðilistanum hjá Býráðnum. Vit rekað ein stovn og noyðast tí at leggja arbeiði til rættis so at vit hava eina javna útskifting av børnum og ikki skifta øll børnini á stovninum í senn.

Hetta merkir als ikki at eg ikki meti at gangast skal eftir bíðilistanum, men eg noyðist at vísa á hvat tað hevði merkt fyri okkara stovn. Skuldu vit í ár tiki øll tey børn, ið eru fødd í 1998 og 1999, og onga ansing hava, merkir tað at vit koma at hava nøkur vøggustovubørn, ið standa við sviði soð og skulu ganga í vøggustovu til tey eru 4 - 5 ár áðrenn tey sleppa í barnagarð, og harvið forða tey fyri at fleiri smábørn sleppa á stovn.

Ein og hvør, ið kennir eitt sindur til vøggustovulív veit at stovnanir eru ikki útgjørdir til at nøkta tørvin hjá børnum eldri enn 3 ár. Vøggustovur eru bygdar og útgjørdar til at nøkta tørvin fyri avbjóðingar til børn undir 3 ár.

Góðu Heðin og Leivur, nær fara tit, ið sita í Býráðnum at síggja veruleikan sum hann er ?

Ein ógvuliga áhugaverdur pallborðsfundur var í Norðurlandahúsinum 27.09.2000, har millum onnur tit báðir sótu í panelinum og vóru spurdir um tit ætlaðu at loysa trupuleikan við barnaansingini, hvussu og um tað skuldi verða parkering ella mennandi tilboð ?

Nógv foreldur og stovnsfólk vóru komin at lurta og bíðaðu spent eftir svarunum.

Heðin Mortensen, førdi tá fram at ansing varð eingin trupulleiki, men eitt fólkaligt krav og at fleiri stovnar skuldu byggjast um tørvur var á tí ella virkir kundu gera ansingarstovnar, at barnaansing ikki var ein útreiðsla men ein íløga fyri samfelagið.

Leivur Hansen segði, at ikki bleiv helma í áðrenn trupulleikin var loystur, vælvitandi at tað tekur nøkur ár.

Trygging bleiv givin um at kvaliteturin (dygdin) av ansingini skal verða í hásætið eisini við alternativum loysnum.

Hetta vóru søt orð í oyrunum á okkum, ið ynskja fleiri stovnar, við mennandi tilboðum til tey børn, ið skulu verða har, men eg dugi ikki at síggja at tit halda orð við nú at føra fram at børnini skulu inn á stovnanar líkamikið hvat tað merkir fyri arbeiði á stovnunum og tað tilrættislegging, ið har fer fram.

Havnin er voksin út um allar breddar og tað einasta sum ikki veksur er talið á stovnum - jú eg eri klár yvir at fleiri stovnar eru bygdir og útbygdir, men tað er ikki nóg mikið, enn væntað fleiri pláss og tørvurin minkar ikki komandi árini.

Tað er ov bíligt at leggja Svarta Per út á stovnarnar og siga at tað eru vit, ið hava skyldina av at bíðilistin ikki verður fylgdur, tí vit velja eftir kyn og aldur. Bíðilistin kemur ongantíð at minkað munandi um ikki fleiri Vøggustovur og Barnagarðar verða bygdar.

Børnini, ið skulu á stovn í ár hava fingið boð og tað gerst ikki umaftur. Foreldur, ið hava fingið pláss skulu ikki føla seg skyldug tí tey taka av plássinum, sjálvt um tey kenna børn, ið eru eldri enn teirra egnu, ið ikki hava fingið tilboð um ansing.

Vit sum stovnsleiðarar eiga eisini at hava góða samvitsku og vit á Konmansmýru gleða okkum til tey nýggju børnini og foreldur teirra byrja hjá okkum.